Landssjúkrahúsið



# Sukurløðsla

# Vegleiðing til barnakonur í samband við kanning av blóðsukri (sukurløðslu)

## Fyrireiking til kanningina

3 dagar áðrenn kanningina eigur tú at hava etið og verið likamliga virkin sum vanligt.
Tú eigur at fasta frá kl. 22 kvøldið fyri, t.e hvørki eta, drekka, roykja, tyggja tyggigummi ella líknandi. Eitt sindur av vatni er loyvt at drekka.
Fyrst verður ein blóðroynd tikin. Síðan fært tú 200 ml. av sukurvatni við sitrón at drekka. 2 tímar seinni verður aftur ein blóðroynd tikin. Hetta tíðarskeiðið eigur tú ikki vera likamliga virkin ella sovna.
Tú ert vælkomain at hava handarbeiði ella okkurt at lesa við, so tíðin ikki fellur so long.
Eftir kanningina kanst tú fara til hús ella arbeiðis, og eta og drekka sum vanligt.



## Á Landssjúkrahúsinum

Tú verður tú biðin um  møta hjá bioanalytikarunum í Útistovu (blái ambulatoriubygninurin) kl. 8 ásetta dagin.

## Á Klaksvíkar sjúkrahúsi

Tú verður biðin um at møta kl. 8.00 á Rannsóknarstovuni. Ikki er neyðugt at biða sær tíð.

## Úrslit og svar

• Er blóðroyndin normal, hoyrir tú onki.

• Er blóðroyndin ávirka fært tú bjóða eyka kanning við Ultraljóð og vegleiðing frá Diabetes amb. og  kostráðgeva. Barnakonur við blóðsukri yvir 9 mmol/l eftir 2 tímum hava graviditets-sukursjúku.

• Tær barnakonur, ið hava eina ov høga sukurløðslu, fáa harumframt eina tíð í Diabetes ambulatoriunum.

Um ikki ber til at møta ásettu tíðina, sig vinarliga frá á tlf.304520, og avtala eina nýggja tíð.

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo